bilførarum.

Arbeiðið at gera eina ferðslutrygdarætlan er sett í gongd í einum felags átaki við aðrar áhugapartar innan ferðslutrygdarøkið. Ætlanin, sum eisini er nevnd í visjón 2015 strategiskjalinum fyri infrakervið, verður ætlandi liðug í heyst og verður eitt týdningarmikið grundarlag undir førda ferðslutrygdarpolitikkinum framyvir.

**Flogferðsla**

Flogvinnan gerst alsamt eitt meira týdningarmikið íkast til føroyska búskapin, eins og flúgving til og úr Føroyum er ein týdningarmikil fortreyt fyri samskiftismøguleikunum hjá virkjum og einstaklingum. Ætlanin er framhaldandi at betra um karmarnar fyri flogferðslu.

Menningin av fysisku karmunum koyrir í tveimum. Sum nevnt omanfyri er ætlanin at útbyggja Vága Floghavn skjótast gjørligt, og verður farið undir at prosjektera hesar útbyggingar sum skjótast. Harumframt er ætlanin framhaldandi at kanna møguleikarnar fyri einari alternativari floghavn aðrastaðni í Føroyum.

Harumframt er ætlanin at dagføra karmarnar í flogferðslulógini, og verður uppskot til ríkislógartilmæli væntandi lagt fyri Løgtingið í heyst. Henda dagføring er m.a. ein týðandi fortreyt fyri ætlanunum hjá landsstýrinum at gerast partur av europeiska flogferðslu marknaðinum.

Í august verða samráðingar millum landsstýrismannin í vinnumálum og danska samferðsluráðharran um mannagongdir í sambandi við yvirtøku av loftferðslumyndugleikanum. Ætlandi verður úrslitið av samráðingunum, at partarnir semjast um at lýsa økið til fulnar, so tað verður greitt til avgerð um yvirtøkuleist. Loftferðslumyndugleikin er í stóran mun reguleraður eftir altjóða ásetingum.

**Olja og Orka**

Aðalorðaskifti hevur verið um uppskot til orkupolitikk, og nýggj elveitingarlóg varð samtykt í síðstu tingsetu. Yvirskipaðu málini fyri nýggja orkupolitikkinum eru, at innan 2015 skulu 20% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orku, og at fiskiflotin skal nýta 15% minni orku í mun til veiðinøgdina. Føroyar eru í stóran mun tengdar at innfluttari olju við tað at umleið 95% av okkara orkutørvi verður nøktaður av olju. Um vit skulu broyta hetta, er neyðugt at vit í nógv størri mun nýta varandi orkukeldur, og at vit gagnnýta okkara orkutilfeingi betri, m.a. við at seta krøv um orkunýtslu í sambandi við bygging og umvæling av bygningum og húsum.

Tær kanningar, sum higartil eru gjørdar í sambandi við Nólsoyarverkætlanina benda á, at Nólsoyggin er sera væl egnað til eina størri royndarverkætlan, sum hevur til endamál at skapa eina burðadygga og óhefta orkuskipan í Nólsoy, har øll orkunýtslan í oynni stavar frá varandi orkukeldum.

Hendan verkætlan varð tikin eitt stig víðari í vár, tá útlendsk orkufeløg gjørdu av at gerast partur av einum verkætlanarbólki saman við okkara myndugleikum, sum skal gera víðari kanningar av hvussu vindorka saman við vetni og nýggjari tøkni kunnu røkka málunum um eitt burðardygt samfelag. Gongur sum ætlað, kunnu fyrstu vindmyllurnar setast upp í Nólsoy í 2009.

Onnur stig eru eisini tikin á orkuøkinum; sum dømi kunnu nevnast arbeiðsbólkurin við umboðum úr Føroyum og Íslandi, sum skal gera innleiðandi kanningar av møguleikunum fyri at leggja kaðal til streymveiting millum Ísland og Føroyar og verkætlanin, sum kannar um alduorka kann gagnnýtast til streymframleiðslu.

Seinni í heyst verður farið undir at bora sætta leitibrunnin á landgrunni okkara, umframt at avtala eisini er gjørd um ta sjeyndu leitiboringina, ið skal borast innanfyri komandi tvey árini. Fyrireikingarnar til triðja útbjóðingarumfar á føroyska landgrunninum eru byrjaðar, og eftir ætlan verður klárt at bjóða út seinni í heyst. Enn er ov tíðliga at siga nakað um áhugan fyri triðja útbjóðingarumfarinum, men grundað á tað virksemi, sum er avtalað á føroyska økinum og boringunum bretsku megin markið, meta vit, at tað er vaksandi áhugi fyri økinum vestan fyri Hetland og harvið eisini fyri føroyska landgrunnin.



**Arbeiðsmarknaður**

**Arbeiðsskaðatrygging**

Nýggj lóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógin) verður løgd fyri tingið í heyst og kemur staðin fyri vanlukku tryggingarlógina. Við nýggju lógini verður lóggávan dagførd í samsvari við lóggávuna á hesum økinum í hinum norðurlondunum. Nýggja uppskotið veitir munandi betri sømdir enn higartil, m.a. viðvíkjandi teimum skaðum og sjúkum, sum nú verða viðurkendar sum arbeiðsskaðar, umframt broyttu upphæddunum, ið verða veittar í endurgjaldi og samsýning.

**Arbeiðsmarknaðarkommissión**

Føroyski arbeiðsmarknaðurin broytist alsamt, eins og tað gerst alt meira vanligt, at fólk velja sær aðrar livihættir enn teir, vit vanliga kenna. Hetta hevur við sær, at fólk seta fram fleiri krøv til arbeiðsmarknaðin, eins og fólk ynskja møguleika at skipa síni viðurskifti soleiðis, sum tað hóskar teimum best. Hesi ynski, sum m.a. fevna um ein smidligari arbeiðsmarknað, soleiðis at lættari verður at sameina arbeiðslív og familjulív, seta stór krøv til allar partar av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Ávís tiltøk eiga tí at verða sett í verk til tess at brynja føroyska samfelagið til komandi avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tískil avgjørt at seta eina kommissión, sum skal viðgera hesi viðurskifti. Kommissiónin skal serliga seta fokus á týdningin av javnvág millum arbeiðslív og familjulív. Kommissiónin skal at gera uppskot um, hvussu betur javnvág kann fáast millum arbeiðs- og familjulív, har endamálið við uppskotunum frá kommissiónini er at økja um trivnaðin hjá løntakarunum í arbeiðinum og heima soleiðis, at sínámillum samskiftið millum familjulívið og arbeiðið gerst so positivt sum gjørligt.

Málið er at røkka einum góðum og mennandi familjulívi, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin sum úrslit av hesum fær væl motiveraðar og innovativar løntakarar.

Talan verður um sera umfatandi arbeiðið, og tí er týdningarmikið, at nóg mikið av tíð verður sett av til hetta endamál. Kommissiónin skal tískil eftir ætlan verða liðugt 1. januar 2009. Byrjað verður við einum almennum seminari í september.

**Einskiljingar**

Fyrireikingarnar til at einskilja 33% av P/f Atlantsflog eru komnar væl áleiðis, og byrjar sølan væntandi í september.

Fyrireikingar eru eisini gjørdar til at einskilja 50% av LÍV og at avhenda 50% av partapenninginum til ognarfelagið LÍV, ið umboðar tryggingartakararnar. Ráðgevarnir leggja í løtuni síðstu hond á virðismetingar av felagnum. Í hesum sambandi hava ráðgevarnir gjørt vart við, at tað er avgerandi fyri virðið á felagnum, at ein partaeigarasáttmáli verður gjørdur við Ognarfelagið LÍV, sum m.a. skal tryggja, at felagið ikki endar í atgerðarloysi. Enn er ikki komið á mál við einari slíkari avtalu. Væntandi byrjar sølan stutta tíð eftir, at partaeigarasáttmáli er gjørdur við ognarfelagið LÍV.

# Mál at leggja fram í 2007

**Uppskot til løgtingslóg um fast samband millum Sandoy og Streymoy**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at veita landsstýrismanninum heimild at stovna partafelag, hvørs endamál skal vera at gera fast samband millum Sandoy og Streymoy og hartil hoyrandi vegagerð og at hava rakstur av tunlinum um hendi.

**Uppskot til løgtingslóg um talgildar undirskriftir**
Lógaruppskotið hevur sum endamál at fremja trygga nýtslu av talgildum undirskriftum.

**Ríkislógartilmæli um broyting í lóg fyri Føroyar um ársroknskap**
Ríkislógartilmælið hevur til endamáls at seta reglur um at lata ársroknskap eftir altjóða roknskaparstandardum í gildi í Føroyum (IFRS).

**Uppskot til løgtingslóg um marknaðarføring**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at gera reglur um marknaðarføring og um atferð á marknaðinum.

**Uppskot til løgtingslóg um ognartøku heimild til flogferðslu endamál**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at veita landsstýrismanninum heimild at ognartaka lendi til flogferðslu endamál.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi lóg um loftferðslu**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at dagføra karmarnar um flogferðsluna til Føroyar og úr Føroyum.

**Uppskot til løgtingslóg um grannskoðarar**
Lógaruppskotið, ið fevnir bæði um skrásettar og løggildar grannskoðarar, hevur til endamáls at styrkja sjálvræði grannskoðaranna og samstundis økja kappingarføri teirra í mun til serliga útlendskar grannskoðarar.

**Uppskot til løgtingslóg um havnir**
Lógaruppskotið hevur sum endamál at gera skilhaldsreglur fyri havnir og reglur um havnavirksemi umframt um vernd av havnum.
Uppskot til løgtingslóg um trygging
Lógaruppskotið hevur sum endamál at frælsisgera tryggingarmarknaðin í Føroyum.

**Uppskot til løgtingslóg um aling av fiski v.m.**
Lógaruppskotið hevur sum endamál at dagføra og tillaga reglurnar serliga viðvíkjandi veitan av loyvum og um møguligt gjald fyri loyvir.

**Uppskot til løgtingslóg um at leggja ognir og skyldur hjá Vága Floghavn í P/F Vága Floghavn**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at veita landsstýrismanninum heimild til at leggja virksemið hjá Vága Floghavn umframt ognir og skuld, rættindi og skyldur í P/F Vága Floghavn.

**Uppskot til løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**
Løgtingslógin hevur til endamáls at dagføra og tillaga reglurnar á økinum í samsvari við lóggávuna á hesum økinum í hinum norðurlondunum.

**Uppskot til løgtingslóg um at stovna partafelag at byggja og reka granskarapark**
Løgtingslógin hevur til endamáls at veita heimild at stovna partafelag, sum skal fyrireika, byggja og reka granskarapark.